# Føroyskur heimsflokkur á N



Rasmus, Hergeir og hinir í Makrel teljast millum bestu bólkar í Føroyum

**Tá AME buldraði Reykjavík um koll leygarkvøldið, var tað við framførslum í heimsflokki frá øllum føroysku bólkunum. Hóast Høgni Lisberg tyktist at vera høvuðsnavnið, smæddust hinir ikki burtur ímillum**

AME REYKJAVÍK
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Umleið 400 fólk vóru komin saman í NASA í gjárkvøldið, har av vóru umleið 100 úr íslendska tónleikaídnaðinum og íslendsku miðlunum, tá Atlantic Music Event vitjaði Reykjavík.

Tiltakið gjørdist framúr væleydnað. Føroysku bólkarnir spældu allir sum ein framúrskarandi væl. Teir vóru í heimsflokki, sum ein úr íslendsku tónleikavinnuni segði við Sosialin.

NASA er best umtókta spælistaðið í Reykjavík, og tað er ikki uttan orsøk. Hølini eru nærum fullkomin til endamálið, tey eru rúmlig, býtt upp í stórt dansigólv og stór øki, har tú kanst sita við borð. Ljóðið var sera gott og so var sera nossligt inni.

## Dikta legði fyri

Konsertin byrjaði við framførslu av íslendska bólkinum Dikta. Tað er sangarin í bólkinum, ið er drívmegin og tann, ið skrivar tónleikin. Talan er um eitt slag av óljóðspoppi, sangirnir eru fitt og rættiliga vanlig poppløg innan ymiskar greinar av poppi, men spæld við nógvum vilskapi og sera larmutt. Onkra løtu hoyrdi tú funk í løgunum, aðra løtu soul og so framvegis.

Dikta framførdi við nógvari spæligleði og tað smittaði eisini meg sum áskoðara. Løgini vóru tó av eitt sindur svingandi góðsku, og hóast framførslan var góð, so sat tú við kensluni av, at hetta var ein nýggjur bólkur, ið kundi arbeitt meira við tilfarinum. Sangarin var góður, og hetta er ein spennandi bólkur, ið vit ivaleyst fara at hoyra nógv til..

## Lena bergtók

Aftan á larmutta tónleikin hjá Dikta fór Lena á pallin. Tað tyktist eitt sindur nakið við tveimum kassagittarum og røddum. Men Lena og Niklas eru ikki hvør sum helst, og tey dugdu væl at fylla risa stóra hølið við sínum tónleiki. Tey løgðu fyri við lagnum um ræðslu fyri myrkrið No Emergency, og hendan byrjanin tyktist eitt sindur ov still til ordiliga at fanga allan salin. Can't Erase It fekk betur fatur í fólki, og tú merkti á áhoyrarunum, at tey lurtaðu. Lagið var framført sera sjarmerandi og deiligt.

Síðan kom besta lagið hjá Lenu, fantastiska Stones In My Pockett. Hetta inniliga og rørandi lagið var, sum altíð framført við sterkum kenslum aftan fyri seg. Tó varð framførslan heldur darvað av larmi í hølinum, ein flokkur av íslendskum monnum stóðu í barrini og kjakaðust harðmælt.

Tað tykist, sum um Lena hevur fingið eitt sindur harða húð á konsert ferðunum seinasta árið, m.a. saman við Beth Hart. Tí aftursvarið til ungu mennirnar var framførslan av Catch 22, har Lena fekk allan salin at klappa við. Hetta vísti, hvussu ótrúliga væl hon hevði fatur í fólki, og hon slepti teimum ikki aftur.

## Marius er okkara óljóðspoppur

Eins og Dikta spælir Marius óljóðspopp, men meðan íslendski bólkurin enn manglar at arbeiða við løgunum, ljóðar Marius, sum ein bólkur, ið hevur arbeitt nógv við sínum tónleiki og hugsað løgini væl í gjøgnum. Ljóðið tykist altjóða, tó við greiðum ávísingum til danskar bólkar sum MEW og Saybia. Men skulu vit døma eftir framførsluni á NASA, so er Marius munandi betur enn hesir heimskendu donsku bólkar.

Ljóðmyndin hjá Marius er gjøgnumførd og ógvislig. Tað er serliga sterka bólkakenslan, ið bergtekur. Teir tykjast at kenna hvør annan væl, og meðan gittarin hjá Hans Marius, bassurin hjá Niels Jákup og trummirnar hjá Jens Paula leggja trygga botnin, kunnu Heðin Ziska Davidsen á gittara og Knút Háberg Eysturstein á tangentum av ymiskum slag, samstarva um at lyfta løgini upp um vanligan popp. Teir geva ljóðmyndini hjá Marius ein sera stórslignan dám, ið onkuntíð kennist symfoniskur. Marius er eitt liðugt konsept, ið er til reiðar at leggja heimin fyri sínar føtur. Tað er heldur ikki nøkur loyna, at sangarin Hans Marius er sera karismatiskur og ein frálíkur oddamaður.

## Bukandi devulskapur

Deja Vu er menter nógv síðan útgávuna av fløguni A Place To Stand On. Framførslan í NASA, var ikki heilt líka góð, sum tann í Grand Rock kvøldið fyri, men hóast tað, var hon sera góð. Nýggjasti limurin í bólkinum er Benjamin Petersen á gittara. Hann gevur bólkinum nógv. Hansara ótrúligu gávur hava lyft tónleikin, og givið teimum onkuntíð ov



Hans Marius er ein karismatiskur oddamaður



Vífillfell bjóðaði føroysku gestunum Restorff í dós